TING-HELLAN

# ES-grundlógin s

TINGHELLUKRONIKKIN

*Bárður Larsen*
*løgfrøðingur*



Sokallaða ES-grundlógin varð undirskrivað av ríkis- og stjórnarleiðarunum hjá ES í Rom 29. oktober 2004. Undirskriftin fór fram á staðnum, har fyrsti sáttmálin um Europeiska Samstarvið, Rom-sáttmálin, var undirskrivaður í 1957. Undirskrivingin verður mett sum týðandi hending, tí ES-grundlógin er ætlað at koma í staðin fyri gomlu sáttmálarnar um Europeiska Búskaparliga Samstarvið (EF) og Europeiska Samveldið v.m. og skal skapa eitt nýtt og felags grundarlag undir ES-samstarvinum framyvir.

Formliga er talan um ein sáttmála um at gera eina stjórnarskipan ella grundlóg fyri Europa. Í yvirskriftini til donsku útgávuna av uppskotinum verða orðini "Traktat om en forfatning for Europa" nýtt. Danir tosa annars vanliga um "forfatningstraktaten" ella "EU-grundloven". Skjalið sjálvt kallar seg sum høvuðsregla "forfatning". Á føroyskum hevði "ES-stjórnarskipan" verið hóskandi, men her verður kortini orðið "ES-grundlóg" nýtt, tá tað longu hevur vunnið sær hevd.

Sum við øllum øðrum broytast politisk og løgfrøðilig fyribrigdi ikki av, at tey fáa annað heiti. Sama er sjálvandi við ES-grundlógini. Hon verður ikki grundlóg fyri Europa, bara tí hon sjálv sigur tað. Neyðugt er at hyggja at innihaldinum, áðrenn tað kann staðfestast, um skjalið meira er grundlóg enn sáttmáli. Orðini grundlóg, stjórnarskipan ella forfatningur verða vanliga nýtt um grundleggjandi politisk og løgfrøðilig skjøl fyri eindir, ið annaðhvørt eru sjálvstøðug ríki ella í hvussu er hava eitt ávíst lægri stig av sjálvstøðu og egnum grundarlagi. Hinvegin er ikki vanligt at kalla grundarlagið grundlóg, tá skipanin einans er grundað á sáttmála millum sjálvstøðugar partar og ikki hevur egna grund ella statsligar eginleikar. Higartil hevur eisini verið vanligt at tosa um sáttmálarnar undir ES-samstarvinum.

Tá ES kortini hevur verið óvanligur altjóða felagsskapur og við síni beinleiðis lóggávu lutvís hevur mint um statsliga skipan, hava summi — eitt nú meira ideologiskir og samveldissinnaðir ES-løgfrøðingar — valt at kalla verandi sáttmálagrundarlagið hjá ES fyri grundlóg. Í sambandi við nýggju ES-grundlógina komu tey eitt sindur víðari, og eydnaðist tað nú hesum vongi — um enn innihaldið ikki fylgdi við — at geva nýggja skalinum í uppskoti formliga heitið grundlóg.

Føroyingar hava ongantíð havt nógv álit á ES (EF). Hetta var støðan, tá Løgtingið í 1974 avgjørdi, at Føroyar skuldu vera uttanfyri, og hetta er støðan enn. Føroyski veljarin hevur helst eina fatan av, at Føroyar eru ov lítlar til at blíva hoyrdar í ES-høpi, og tá útlit hartil ikki eru fyri varandi føroyskum undantøkum innan fiskivinnupolitikkin, kemur limaskapur ella innliman ikki uppá tal. At føroysk áhugamál at síggja til ikki lættliga kunnu sameinast við ES-áhugamál kemur í politiska retorikkinum ofta fram á tann hátt, at karikaturar verða teknaðir av ES. ES verður sæð sum ein politisk makt, ið fer at gera av við allar tjóðir í Europa, og summi hava enntá hildið ES vera djórið í Bíbliuni. Henda ræðumyndakenda fatan sær út til at verða tikin fram aftur nú í sambandi við ES-grundlógina, og kanska tey samveldissinnaðu eisini hava ein part av ábyrgdini, tá tey endiliga vilja, at skjalið skal eita grundlóg.

Í føroyska valstríðnum upp til fólkatingsvalið 8. februar í ár vóru fleiri valevni, sum høvdu hug til at gera ES-grundlógina til eitt valtema, og fatanin var tann sama gamla. Eitt valevni metti, at Føroyar fóru at kvælast, um Danmark samtykti ES-grundlógina, og at slíkt vildi bumba føroyska sjálvstýristilgongd 100 ár aftur í tíðina. Eitt annað valevni helt, at ES-grundlógin var tað málið, sum hevði størstan týdning í komandi fólkatingsskeiði, tí ein donsk samtykt av ES-grundlógini í ringasta føri var at javnmeta við, at Føroyar ikki longur fóru at vera partur av danska ríkinum, men einans limir í einum ES-ríki. Eisini fleiri onnur valevni royndu at gera nógv burturúr hesum og høvdu eisini hug til at halda, at hetta stigið við ES-grundlógini var tað mest týðandi fram móti at stovna europeiska samveldisstatin.

Men slíkar ræðumyndir um ES, og nú um nýggju ES-grundlógina, hava onki við veruleikan at gera. Veruleikin er heldur, at ES ikki er so sterkt, sum føroyingar ofta halda, og at ES-grundlógin heldur ikki broytir Europeiska Samveldið serliga nógv samveldisvegin. Mesta av tí, har Europeiska Samstarvið kann vera "vandamikið" fyri føroyskt sjálvstýri, er annahvørt



longu politiskur veruleiki ella hevur onki beinleiðis við ES-grundlógina at gera. Her verður serliga hugsað um, at fiskivinnan búskaparliga sæð framvegis er altavgerðandi fyri Føroyar, samstundis sum Danmark hevur latið ES sín ræðisrætt á sama øki. Henda tvídeilda støðan hjá danska ríkinum mótvegis ES á fiskivinnuøkinum skapar tí longu gróðrarbotn fyri áhugakonfliktum í samstarvinum millum Føroyar og ES við Danmark í miðuni. Á hesum øki, har politisku áhugamál Føroya fyrst og fremst liggja, eru tískil longu prinsipiellir trupulleikar, har tað kundi verið hóskandi at ruddað upp; møguliga á tann hátt, at Føroyar fingu eina veruliga og sjálvstøðuga samráðingar- og sáttmálaheimild á økinum. Hinvegin hava tær avleiðingar fyri uttanríkis- og trygdarpolitikkin, sum ES-grundlógin møguliga ber í sær, lítlan og ongan áhuga fyri føroyingar, so leingi semja ikki fæst um at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki.